## DAGSINS MEINING

# Heilsu- og umhvørvis-politikkur upp á hvamsvís!

Hóast landsstýrissamgongan setti sær fyri at lætta skatta- og avgjaldstrýstið, er ætlanin at leggja fleiri avgjøld fyri at fáa javnvág á fíggjarlógina. "Bomm-avgjaldið" og "plastikkposaavgjaldið" eru tey nýggju avgjøldini, landsstýrið ætlar at seta í verk. Hesi avgjøld eru kortini latin í annan ham, fyri at tað ikki skal síggjast út sum um tey bara verða sett í verk fyri at útvega tí, sambært Karsteni Hansen, tjokkfulla landskassanum.

Avgjaldið á søtmeti og sodavatn kallast "heilsu-gjald". Orsøkin er, at fólk skulu fara at hugsa meira um heilsuna og eta minni av tí søta og leskiliga, sum er á hillum við hvørt kassaapparat í landinum. Av-gjaldið á ruskposar hevur fingið heitið um-hvørvisgjald, tí tað skal fáa fólk til at keypa færri plastposar, tí hesir enda, sum vit ofta síggja, úti á vegum ella í náttúruni.

Tey flestu kunnu taka undir við, at vit skulu hava ein konstruktivan og fyribyrgjandi heilsupolitikk. Somuleiðis eru tey flestu samd um, at vit kunnu seta í verk umhvørvisgjøld, um veruliga ætlanin er at fáa fólk og virki at dálka náttúruna - umhvørvið - minni.

Men hetta er bara ikki ætlanin við hesum nýggju gjøldunum. Tí hevði landsstýrið verið nógv erligari, um tað kallaði ein "spaka fyri ein spaka", og fann upp á neyðloysnir fyri betri at kunna selja hesi nýggju avgjøld. At talan ikki er um heilugjøld og umhvørvisgjøld hava fólk og serfrøðingar á hesum økjum víst aftur so dyggiliga og manað í jørðina. Somuleiðis hava fremstu búskaparfrøðingar lands-ins mælt frá hesum neyðareggum hjá landsstýrin-um.

Í einum heldur jánkasligum innslagi í Degi og Viku fríggjakvøldið segði Eyðun Eltør, at hann hevði hugsað um at seta í verk umhvørvisgjøld sum liður í einum umhvørvispolitikki. Men hví kom hann ikki við uppskotum í vár, tá uppskotini vórðu oyst niðan í Tingið? Hann kom so bara við einum uppskoti í síðstu tingsetu. Og tá avtornaði var uppskotið á náttúruøkinum tikið aftur.

Nei, nýggju uppskotini eru ikki liður í einum konstruktivum politikki. Tey eru uppfunnin upp á hvamsvís fyri at fáa nóg nógvar inntøkur, so javnvág fæst á fíggjarlógina. Og er hetta ikki júst í tráð við góðan Fólkaflokspolitikk, sum til hvørt val lovar skatta- og avgjaldslætta, hóast gongdin altíð er hin øvugta. Minnist til rokningina frá Tjóðveldis-, Fólka-, Sjálvstýris- og Miðflokkinum í vár: hægri mjólkarprísir, hægri sjónvarpsgjald og hægri ferðaseðlaprísir við Strandferðsluni! Og nú skal so eitt søguligt bommgjald og plastikkposagjald bjarga fíggjarlógini á hesum sinni. Tillukku Karsten, Óli, Eyðun og Jenis! Sannir garpar! Forrestin, hvussu nógv fer eitt Time Out nú at kosta Karsten?

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Avrik — fyri hvønn

**Finnur Helmsdal**



Nógv hevur seinastu tíðina verið sagt og skrivað um uppskotið hjá akademikar-unum um, at landið nú skal løna starvsfólki í mun til avrikið. Víst hevur verið til ymsar slavsíður við upp-skotinum. M.a. at tað er torført at meta um avrik hjá t.d. pedagogum, sosialráð-gevarum, sjúkrasystrum, lærarar og øðrum, sum starvast primert við menn-iskjum.

Um pedagogurin í barna-garðinum skal fáa stig, gráta børnini lítið, ella í mun til, hvussu reyðir og veðurbardir kjálkarnir á børnunum eru, ella í mun til, hvussu kreativur hann er?

Soleiðis kundi ein hildið á við at sett spurnartekin við, hvussu teir ymsu fak-bólkarnir kundu fingið savnað neyðugu stigini til ein feita lønarhækkan.

Onnur slavsíða, ið nevnd er, snýr seg um andan á abeiðsplássunum, tá starvs-fólk skulu kappast um at fáa viðurkent sítt avrik sum tað besta. Akademikararnir siga, ja, men tað fer at elva til kapping. Okay, men tað fer sanniliga eisini at elva til øvund, smikran, baktal-an, hatur og slíkt, sum verri er. Ein skipan við avriksløn fer á flestu arbeiðsplássum, at elva til mistrivnað og vánaligan arbeiðsanda.

Aðrar slavsíður hava eisini verið nevndar. Skal ikki gera meira burtur úr enn kanska at seta ein lítlan kíla í við at koma við pá-standi um, at tað júst eru limirnir hjá Búskapar- og Løgfrøðingarfelagnum, sum hava bestu møguleik-arnar fyri at gagnnýta skip-an við avriksløn, og vil skipanin tí í hvussu er økja um lønar- og stættamunin.

**Avrik — fyri hvønn**

Í uppskotinum um avriks-løn liggur ikki bert ani-mering fyri hægri løn, har er eisini animering til betri avrik, eitt betri og kanska í seinasta enda bíligari ar-beiðspláss. Men hvat er tað fyri avrik, hugsað verður um. Avrik fyri hvønn. Skulu avrikini tæna brúkar-unum ella stjóra og eisini arbeiðsgevara. Skulu starvsfólk premierast fyri at veita brúkarunum betri tænastur, ella skulu tey premierast fyri at spara og gera tænastuna verri?

Er tað nakar í Búskapar- og Løgfrøðingafelagnum, sum hevur hugsað um tað? Nevniliga, hvørjum skulu hesi avrikini tæna? Merki tað at avrikið er gott, um starvsfólk ger sum stjórin sigur, tá ein hevur megnað at tulka ivasama lógargrein soleiðis, at viðskiftafólkið einki fekk, hóast tørvurin var eyðsýndur, ella tá ein hevur handfarið eitt mál á rættan hátt, ella tá ein er farin væl við viðskiftafólk-unum, ella nær …?

Settu vit ein bólk, man-naður við tíggju viðkom-andi persónum, at orða eina lýsing av, hvat eitt gott avrik er í almennum ar-beiði. So fingu vit uttan iva tíggju ymiskar lýsingar.

**Avrikið hjá arbeiðs-plássinum**

Nei, eg haldi vit skulu halda okkum langt frá skip-anum við avriksløn. Finn Normann doktrinin fekk almennu umsitingina at vassa langt nokk út í in-kompetentan hurlivasa. Almenna umsitingin er, sum er, stødd á djúpum vatni. Alt ov nógv fólk hava fingið alt ov stórt vald í mun til tað, tey megna. Nú skulu vit ikki vassa víðari soleiðis, at ávís skulu kunna profittera upp á tann hurlivasa, sum valdar. Vit hava dugnalig starvsfólk í almennu umsitingini. Tað sum umræður, er at vit koma okkum undan avleið-ingunum av óvanliga in-kompetentu (og kanska eisini tilætlaðu) ætlanini hjá Finn Normann Christ-ensen.

Búskapar- og Løgfrøð-ingafelagið hevur rætt, tá tey siga, at stundin er kom-in til at fáa skil á og hækka dygdina í almennu um-sitingini, men tað skal ikki gerast við at spæla fólk út móti hvørjum øðrum og við at sleiska fyri stjóranum. Tað skal gerast við at menna starvsfólk fakliga (eisini tey í Búskapar-&Løgfrøðingafelagnum). Tað skal gerast við, at samlaða arbeiðið (avrikið) hjá stovninum verður mett í mun til játtanina. Tað krevur, at politiska valdið gera sær greitt, hvat skal fáast fyri játtanina, og um tað so kemur burturúr. Hetta krevur, at politiska valdið (ikki blandar seg í smálutir) men kennir økið so mikið væl, at tað veit, hvat tað kostar, og hvat skal koma burturúr. Tað merkir ikki, at politikarin skal krevja meira fyri pengar-nar, enn tað er møguligt at fáa fyri teir.

Í einari slíkari prosess vil altíð verða mett um evnini hjá ávísum, og nøkur sita fastari í sessinum, nøkur koma hægri upp, meðan onnur missa tign ella arbeiðið. Soleiðis hevur altíð verið, og soleiðis vil altíð verða. Kanska hevur rættvísi ikki altíð valdað í slíkum prosessum, og kanska hava tað ikki altíð verið røttu áhugamálini, sum hava stýrt teimum.

Men skulu vit meta avrikið, skulu vit meta um politikararnir nú hava fingið tað, teir ynsktu. Tað er samlaða avrikið hjá stovninum sum skal metast um, og ikki avrikið hjá tí mest "stjóravinarliga".

Fáa vit á henda hátt hækkað støðið í almennu umsitingini, fáa vit á henda átt eina betri og meira dynamiska almenna um-siting, ja, so fer lønin uttan iva at koma.

# Floksleiðslusamtykt 20. sep. 2003

Floksleiðslan í Javnaðar-flokkinum, ið er tingbólkur, starvsnevnd og umboð fyri lokalfeløgini, hevur í dag verið saman á regluligum fundi.

Á fundinum greiddi for-maðurin frá tí tilburði á almennari samkomu, sum hevur verið umrøddur í fjølmiðlunum. Formaðurin endurtók fyri floksleiðsluni ta umbering, sum hann eis-ini alment hevur borið fram, og gav flokkinum lyfti um, at slíkt ikki aftur kemur fyri.

Floksleiðslan harmast og átalar tilburðin og tekur til eftirtektar umbering og lyfti formansins.

Ein samd floksleiðsla sær tilburðin sum eina hending, sum ikki endurtekur seg, og veitir formaninum fullan stuðul.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]


**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.



## VIÐMERKINGAR

# Nakrir tankar um eldraøkið

**Gerhard Lognberg**
*borgarstjóri í Skopun og løgtingsmaður*



Tað verður nógv tosa um eldraøki í hesum tíðum. Andrias Petersen setti landsstýrismanninum Páll á Reynatúgvu ein fyrispurn-ing. Andrias kennur sjálv-sagt væl til hetta økið sum lækni, og má reingerð verða ein sjálvsagdur part-ur í skipanini tí annars trív-ast fólk ikki. Sjálvsagt má peningurin verða fyri at arbeiði kann útynnast, rein-gerð kann ikki verða tað, sum verður niður priori-terað.

Ein kanning er herfyri gjørd um, hvat heimarøktin pláss kostað fyri hvønn brúkara.

Í Sosialinum 17. sep. stendur í brotinum "Sand-oyingar fáa sersømdir"at "Tað hevur verið ein meg-inregla, at í landinum skulu hava javnbjóðis kor, tí øll gjalda tað sama í lands-skatti", síðani stendur at hetta er ikki galdandi fyri heimrøktina.

Í Sandoy kostar eitt røkt-arpláss kr. 7.200 fyri hvønn íbúgva um árið, í hinum økjunum kostar tað kr. 4.400.

Í fyrispurningi á løg-tingið spurdi Katrin D. Jakobsen um støði skuldi leggjast eftir Sandoy ella restini av landinum.

Tað sum undrar meg er, at eg dugi ikki at síggja nakað marglæti í Sandoy frammum aðrastaðni. Fólk-ini á heiminum hava tað gott, starvsfólkini eru sera dugnalig og tey eldru trív-ast.

Men Sandoy liggur nokk-so avskorin frá megin-økinum, tey gomlu hava sostatt slettis ikki møgu-leikan til alt tað, sum onnur í meginøkinum kunnu. Men sum sagt, tey hava tað gott saman við arbeiðsfólki og leiðslu.

Eg fari at heita á lands-stýrismannin um at kanna, hvar hesin munurin stavar frá tí tað má verða ein saklig frágreiðing um, hvar hesin munur kemur fram.

Sjálvur havi eg verði ein at teimum, sum metti at kommunurnar eiga sjálvar at stýra eldraøkinum, alt hetta tosi og frágreiðingar gera meg ósikran.

Til síðst til Katrin Dahl Jakobsen. Um so er at tað í veruleikanum er so stórur munur (sum eg slettis ikki meini sjálvur) og støði í Sandoy skal lækka, so kunnu tit nokk beina fyri heimunum í Sandoy, sum verða forsvarliga rikin og við ábyrgd.

Men eg hopi at landsstýr-ismaðurin Páll á Reyna-túgvu kemur við eini sak-ligari grundgeving í bløð-unum, so hesir løgnu på-standir kunnu afturvísast.

# Konsert

TÍÐINDASKRIV

Hósdagin 25. og fríggja-dagin 27. sept. fara svensk-arin Anders Nyqvist, trom-pet og føroyingurin Andras Olsen at hava konsertir, hósd. 25. kl. 20 í Fríðriks-kirkjuni á Toftum og leyg-ardagin kl. 1900 í Lista-skálanum í Havn. Klaver-fylgispælið hevur Jóhannes Andreasen.

Meðan teir gingu á Royal Academy of Music í Lond-on frá 2000 til 2002, funnu teir útav at teimum dámdi at vera kreativir og at teir vildu framføra nútíðar klassiskan tónleik. Við sínari klassisku útbúgving, eru teir báðir á einum máli um, at klassiskur tónleikur má leggjast til rættis eftir nútíðar fólki og samfelag.

Skráin verður fjølbroytt við ymiskum undirhaldi, t.d. sjónleiki har ymiskur tónleikastílur verður brúkt-ur.

Í hesari vikuni fara teir at spæla á skúlum í Havn og í Suðuroynni, har teir vísa børnum og ungum nakað av tí, teir sum klassiskir tónleikarar arbeiða við.

Anders er 26 ára gamal og føddur í Svøríki. Hann byrjaði at spæla trompet sum 10 ára gamal. Hann hevur sína tónleika-út-búgving frá Hong Kong Academy for Performing Arts og Royal Academy of Music í London. Anders arbeiðir við nøkrum av teimum bestu evropeisku orkestrum og bólkum, tá hann ikki arbeiðir sum solistur ella hyggur eftir fóbólti (Anders heldur við Arsenal).

Andras er 25 ára gamal og er føddur í Føroyum. Hann byrjaði at spæla trombon sum 13 ára gamal eftir at hava spælt euphon-ium í 3 ár. Andras hevur sína tónleika-útbúgving frá Det Jyske Musikkon-serva-torium í Århus og Royal Academy of Music í Lond-on. Eins og Anders arbeiðir hann við nøkrum av bestu evropeisku orkestrum og bólkum, tá hann ikki ar-beiðir sum solistur ella hyggur eftir fóbólti (Andras heldur við Liverpool).

Konsertirnar stuðla: Mentunnargrunnur land-sins, Konsertfelagið, Tórs-havnar Býráð og Havnar Hornorkestur.

# Fullveldisskattur

**Bárður Nielsen**
*løgtingsmaður*



Vit hava seinastu dagar-nar fingið ein forsmakk uppá hvat vit kunnu vænta okkum frá sam-gonguni í samband við, at fáa fíggjarlógina fyri 2004 at hanga saman — ella í øllum føri pynta eitt sindur uppá undir-skoti. Hetta prógva sig-nalini samgongan hevur sent út, at nú skal av-gjaldi av góðgæti og sodavatni hækkast mun-andi og at ein króna skal gjaldast av hvørjum beriposa til landskassan.

**Grundgevingarnar**

Grundgevingarnar eru, at vit skulu eta sunnari og verja umhvørvi, men sjálvsagt er hetta fyri at fáa fleiri inntøkur í landskassan, nú inn-tøkuvøksturin frá skatti og avgjøldum annars sær út til at flata út, hetta sum ein fylgja av fall-andi fiskaprísum og ringvirkningarnir frá niðurskurðinum í blokk-inum.

Grundgevingarnar fyri góðgæti og soda-vatni eru kanska á eini leið, tí um prísirnir á hesum vørum hækkar kann roknast við, at minni verður keypt. Men um samgongan meinar, at vit skulu hava ein sunnari ungdóm, hví er so stuðulin til ítrótt skerdur síðstu árini, tí er tað nakað ungdómurin hevur brúk fyri í dag, er tað at verða meira í rørslu, men kanska játt-anin til ítrótt hækkar samsvarandi inntøku-hækkingini av omanfyri nevndu eykaavgjøldum.

Men grundgevingin fyri, at leggja eina krónu í avgjaldi á hvønn beri-posa og kalla hetta ein umhvørvisskatt er heilt burturvið. Tí beriposar-nir, ið verða nýttir í dag eru als ikki skaðiligir fyri umhvørvi, tá ið ein posi verður brendur, er tað einans koltvíilta og vatn í kemur frá brenn-ingini. Og um meiningin við uppskotinum er, at fáa fleiri inntøkur til landskassan er hetta eisini ivasamt, tí at roknast kann við at ein beriposi verður so dýrur, at eingin vil keypa pos-an og so verður heldur ikki avgjald goldið í landskassan.

**Framleiðsluvinnan**

Vit hava eitt virkið í Føroyum, ið hevur víst at teir eru kappingarførir við útlendingar, og tí framleiðir ein stóran part av beriposinum, ið verða bruktir í Føroyum og er hetta virkið eitt av teimum fáu virkjunum vit hava, ið framleiðir brúksvørur sum tálma innflutninginum og her-við bøta um okkara handilsjavna við um-heimin. Av tí at fram-leiðslan av beriposum er ein rættiliga stórur part-ur av samlaðu fram-leiðsluni vil hetta upp-skoti verða til óbóta-ligan skaða fyri hetta virkið.

Umsitingarliga verður ómøguligt at tryggja, at avgjald verður goldið av øllum beriposum, eitt nú er tað heilt vanligt, at handlar fáa beriposar við ymiskum merkjum á ókeypis í samband við keyp av eini vøru frá út-landinum og her verður tað eingin annar enn føroyski framleiðarin í er stóri taparin, saman við brúkarinum.

# Íslendsk fyritøka bjóðar føroyingum viðgerð fyri sjónbrek

TÍÐINDASKRIV

Føroyingar við ringum eyg-um fáa nú ein møguleika at rætta brekið. Dagarnar frá 26. til 28. september verða Eiríkur Þorgeirsson og Þórður Sverrisson, serfrøð-ingar hjá fyritøkuni Laser-Sjón í Reykjavík, staddir í Føroyum og bjóða tá fólki við sjónbreki at koma til kanningar. Tey, sum lata seg kanna, verða eisini kunnað um, hvussu brekini kunnu verða rættað við serligari lasaraviðgerð á viðgerðar-stovu í Reykjavík

LaserSjón er fremsta fyritøkan av sínum slag í Íslandi og hevur rættað sjónbrek hjá fólki farnu 3 árini við framkomnastu lasaraútgerð, sum finst á økinum. Teir báðir ser-frøðingarnir, sum koma til Føroya, hava hesi árini viðgjørt meira enn 1000 fólk við góðum úrsliti. Teir teljast millum royndastu norðurlendsku eygnalækn-arnar yvirhøvur og hava sjálvir stovnað LaserSjón.

**Fáa fulla sjón**

Viðgerðarhátturin, sum LaserSjón nýtir, kallast Lasik. Hetta er vanligasta viðgerðin fyri sjónbrek, og milliónir av tílíkum við-gerðum verða framdar í heiminum hvønn dag. Viðgerðin er væl egnað til teirra, sum vilja sleppa av við brillurnar ella linsurnar ella tola illa linsur. Um brillurnar ella linsurnar eru ein bági í gerandisdegnum, er Lasik-viðgerðin rætta loysnin, vísa royndirnar.



Ein kanning hjá ameri-kanska heilsu- og heili-vágseftirlitsstovninum FDA vísir, at tólini, sum LaserSjón nýtir í sínum viðgerðum, rigga serstak-liga væl. Niðurstøðan av kanningini er, at 87,3 prosent av teimum, sum fara í viðgerð, fáa fulla sjón, 12,4 prosent fáa mun-andi betri sjón, og bara 0,3 prosent fáa ikki nøktandi hjálp.

**Fyrsti føroyingur**

Fyrsti føroyingur, sum var í viðgerð hjá LaserSjón, var stjórin í Atlantic Airways, Magni Arge, sum eftir við-gerðina í fjør hevur lagt linsurnar og brillurnar á hillina. Kontaktpersónur hjá LaserSjón í Føroyum er Kaj Vilhelmsen, eygna-lækni, sum síðan 1995 hev-ur starvast á eygnadeildini á Landssjúkrahúsinum og er serútbúgvin eygnalækni.

Tey, sum vilja vita, um teirra sjónbrek kann rætt-ast, kunnu bíleggja sær tíð til at verða kannað hjá Eiríki Þorgeirsson og Þórði Sverrisson, nú teir koma á vitjan í Føroyum. Tað kann gerast við at senda ein teldupost til lasersjon@lasersjon ella við at ringja 322825. Til ber eisini at lesa meira um virksemið hjá íslendsku fyritøkuni á www.lasersjon.fo